**Munnligur fyrispurningur**

**til Karsten Hansen, landsstýrismann**

**um 10 mió. kr. í meirnýtslu til serviðgerð uttanlands**

1. Hvussu stór er endaliga meirnýtslan til serviðgerð uttanlands í 2012 í mun til játtanina á fíggjarlógini ?

2. Hvørjar eru høvuðsorsøkirnar til meirnýtsluna ?

3. Nær varð landsstýrismaðurin upplýstur um, at talan fór at verða um eina meirnýtslu til serviðgerð uttanlands í 2012 ?

4. Eru aðrar játtanir, ið landsstýrismaðurin í heilsumálum umsitir, ið hava meirnýtslu í 2012 ?

5. Hvørjar verða avleiðingarnar av meirnýtsluni í 2012 ?

6. Hvat verður gjørt fyri at fyribyrja meirnýtslu í 2013 ?

7. Játtanin til serviðgerð uttanlands er minni í 2013 enn í 2012, fer landsstýrismaðurin at biðja um eykajáttan ?

**Viðmerkingar**

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur alment fráboðað at ein munandi meirnýtsla var til serviðgerð uttanlands í 2012. Helst eru um 10 mió. kr. eru meira nýttar, enn fíggjalógin fyri árið hevði sett av.

Samstundis er minni sett av til serviðgerð uttanlands í 2013 enn í 2012.
Á fíggjarlógini fyri 2012 vórðu 136,6 mió. kr. játtaðar til serviðgerð uttanlands. Í 2013 eru 135,3 mió. kr. játtað.

Tá landsstýrismaðurin longu nú veit, at meirnýtslan í 2012 helst er um 10 mió. kr. í mun til játtanina, er greitt, at væntast skal at játtanini til serviðgerð uttanlands í 2013 verður ov lítil.

Fyri at fáa lýst hvørjar orsøkirnar eru til meirnýtsluna, nær landsstýrismaðurin kendi til hesa, og hvat verður gjørt fyri at fyribyrgja meirnýtslu í 2013, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 25. februar 2013

**Kristina Háfoss**

Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi